SOSIALURIN 25
FRÍGGJADAGUR 28. JUNI 2024


# Pionerurin í føroyskari **millumlandasigling áttati**

Hósdagin fyllir Óli Hammer í Havn 80 ár. Sosialurin hevur hitt mannin, sum meira enn onnur hevur sett síni fingramerki á ferðafólkasigling millum Føroyar og umheimin seinastu hálvu øldina fyrst sum skipari á Smyrli – seinni sum stovnari og stjóri á Smyril Line

Eirikur Lindenskov

Vit hitta Óla Hammer hendan dagin í hugnaligu stovuni hjá honum og Marthu við Marknagilsvegin í Havn. Her er útsýni yvir allan býin, allan fjørðin og Nólsoynna.

Á myndini hava vit Óla og Marthu í sofuni undir stóra málninginum, sum Livar Nysted í Hvannasundi hevur málað av øllum trimum skipunum, sum Óli Hammer hevur ført millum Føroyar og umheimin við ferðafólki: Smyril, sum kom í 1975, fyrra Norrøna, sum kom í 1983 og seinna Norrøna, sum kom í 2003. Tey koma øll grøvandi inn eftir Nólsoyarfirði ímóti Havnini á myndini hjá Livari.

## Oyndfirðingur og nunnfrensur í Havn

Óli Hammer er føddur í Oyndarfirði 4. juli í 1944, har familjan búði fyrstu fimm ár hansara. Pápin Hendrik var úr Oyndarfirði, og mamman Jona var frá Norðskála.

– Tað mesta sum eg minnist til Oyndarfjørð er, tá eg var og ferðaðist, sigur Óli.

Familjan flutti til Havnar í nýggj hús, sum tey høvdu bygt í Jákups Nolsøes Gøtu, tá Óli var fimm ára gamal í 1950, so har vaks hann upp.

Pápin fekk starv hjá Strandferðsluni, tá tey komu til Havnar, sum maskinmaður við gomlu Rituni.

– Sum eg havi skilt tað, so var mamma ikki so væl fyri, og tá Oyndarfjørður lá so avsíðis uttan vegasamband og var brimpláss, og hon kláraði ikki at ganga um fjøll. Tí ynskti hon at flyta, men hon búði so í Oyndarfirði í eini 10 ár av sínum yngru árum, sigur Óli.

– Í Havn treivst familjan væl, og tað frættist eisini, at vit fluttu fyri at systir mín og eg skuldu fáa betri skúlagongd. Men skúlin var ongantíð mítt, sigur Óli Hammer.

Hann gekk í skúla hjá nonnunum í Havn og seinni í Realskúlanum.

– Tað bleiv eitt kompromis, at eg skuldi í realskúla, tí tað var slett ikki tað, sum eg vildi. Eg vildi sleppa til skips, greiðir Óli Hammer frá.

## Familjan hevði mist nógv á sjónum

Mammuni dámdi tað einki, tí hon hevði mist nógv á sjónum. Pápi hennara og tveir beiggjar doyðu á sjónum í 1942, tá teir ikki komu aftur, eftir at hava verið á útróðri. Ein annar maður var eisini við í bátinum, sum eisini gekk burtur.

Teir vóru farnir frá Norðskála og høvdu verið norðuri í Flógvanum á útróðri, men bóru ikki boð aftur í bý.

Teir sum fórust vóru abbi Óla, Zacharias, og mammubeiggjarnir Andreas og Óli, tann yngri var bara 16 ára gamal, og ein annar maður úr bygdini, sum æt Martin.

– Eg eiti Zakaris Andrias Óli Martin, sigur Óli.

Umframt hesa vanlukkuna sum rakti húskið hjá mammu Óla, so var pápi Óla, Hendrik, eisini í eini bátsvanlukku í 1939, tá hann sum tann einasti kom aftur eftir grindaferð í Oyndarfirði. Hann varð bjargaður á Múlanum, liggjandi á sjónum. Hini tríggir, sum vóru við í bátinum, spurdust ikki aftur.

Systir Óla eitur eftir vanlukkubátinum, sum pápin var við.

– So tey plaga at siga, at vit eita eftir hvør sínari katastrofu, so Óli heldur skemtiliga.



Óli Hammer og konan Martha. Málningin hevur Livar Nysted málað av teimum trimum ferðamannaskipunum, sum Óli Hammer hevur havt ábyrgdina av og sum hava ført ferðafólk millum Føroyar og umheimin seinastu næstan hálvu øldina. Óli Hammer var við eftir Smyrli, sum fór í uttanlandssigling í 1975 – og síðani hava hesi trý skipini røkt sambandi. Hósdagin fyllir Óli Hammer 80 ár Mynd: Jens Kristian Vang

## Óli fór í skúla hjá nunnunum

Sum seks ára gamal fór Óli í skúla hjá nunnunum.

– Tá vóru bara nonnur, sum undirvístu, men tó var ein føroyingur, sum var lærari. – Og so kom ein føroysk lærarinna afturat, hon æt Julia Vang, greiðir Óli frá.

Óli greiðir frá, at nunnurnar eisini undirvístu teimum í føroyskum.

– Vit høvdu eina nunnu, sum vit grinu so nógv eftir, tá hon úttalaði føroyskt, og hon østi seg upp og segði so:

– Alt í lagi, eg dugi ikki at snakka føroyskt, men eg dugi betur at skriva enn tit, segði hon.

Eftir Nunnuskúlan fór Óli í Realskúlan, sum tá var skipaður sum fýra ára millumskúli og eitt ár realskúli,

– Eg hevði ta æru at hava ta kendu frøkun Kohr, sigur hann, og Christoffer Lützen var yvirlærari.

Frøkun Cohr var donsk gomul genta, tiltikin fyri at fara illa við tí, sum føroyskt var.

– Hon var stjóri, tá vit komu í realskúlan. Eg minnist, hvussu hon fanst at skrift okkara, sum vóru komin úr nunnuskúlanum, greiðir Óli Hammer frá.

– Vit skrivaðu eina aðra skrift, men hon vildi ikki vita av hesi skriftini, sum vit høvdu lært hjá nunnunum. Vit skuldu so skriva hina skriftina og leggja um frá nunnuskrit til skráskrift. Og tað endaði við onkrum ljótum klóri og at vit fingu eina ljóta hondskrift, sigur hann. – Tað endaði við, at vit dugdu hvørki. Óli nevnir fleiri harðligar lærarar, sum ikki fýrdu fyri at sláa. Men hann nevnir tó Bjarna Niclasen, sum var heilt øðrvísi.

– Hann rørdi okkum ikki, var ein óluksáliga sympatiskur maður, sum tók okkum í forsvar, um okkurt var á vási, sigur Óli Hammer.

## Til skips

Eftir millumskúlan fór Óli Hammer til skipst. Tað bar til at steðga eftir millumskúlan og ikki fara í real. Tað gjørdi Óli.

– Tað var kompromiið við foreldrini, og tað vóru fleiri, sum steðgaðu eftir millumskúlan, sigur hann.

Óli fór fyrsta túrin við Gamla Andras og var við út í eitt, til hann fór tveir túrar við Marius mammubeiggja, og so aftur við gamla Andras, og endaði við nýbygninginum Leiki, á hemaraveiðu.

Leikur var fyrsta yvirdekkaða skip í Føroyum tá.

Komin heim eftir drúgvan túr fór hann á skipsføraraskúla í januar 1965, á stýrimansskúla á vári í 1966 og á skipsføraraskúla á heystið í 1967.

## Verið á brúnnið síðani

Í nøkur ár sigldi Óli hjá ØK. Men tað vóru drúgvir túrar, og hann var leingi burtur frá familjuni.

Tí fekk hann sær kjans heima aftur. Í veruleikanum var tað pápin, sum eggjaði honum at fara á brúnna heldur enn at gerast maskinmaður. Tí tað arbeiðið var so skitið og tað bera sót.

Pápin var fyrst við Rituni og seinni við Sildberanum, Bragd og til endans umborð á Pride

## Kom á Strandferðsluna

Tá Strandferðslan søkti avloysara til skipara við Dagstjørnuni, sum var ein ein línubátur, sum sigldi við frakt, søkti Óli starvið. Tað var í 1973 um várið. Dagstjørnan var eisini nýtt til vaktarskip. Síðani fór Óli umborð á Smyril, og hann var við í Danmark eftir nýggja Smyrli í 1975.

– Tað var ein stór hending og ein stór broyting, serliga innanoyggja. Alfred Jacobsen og Óli Hammer skiparar við nýggja flaggskipinum hjá Strandferðsluni, sum fór í sigling summarið 1975.

Hann var eisini við, tá Strandferðslan keypti systurskipið hjá Smyrli, sum fekk navnið Teistin. Hetta var í 1979, eftir at mikil orðadráttur hevur verið millum føroyskar politikarar um at keypa donsku ferjuna Lasse II til uttanlandasiglingina.

Teistin gjørdist eitt neyðsemjuuppskot, sum Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin á aðrari síðuni og Fólkaflokkurin á hinari síðuni kundu liva við. Hesir flokkar mannaðu landsstýrið, sum tá sat, og teir vóru rættuliga ójavnir á máli um, hvørt tað almenna skuldi vera við í uttanlandssigling. Men politiska orrustan um uttanlandasiglingina hjá Strandferðsluni steðgaði ikki fyri tað, um landsstýrið gjørdi av at keypa Teistan. Á heysti í 1980 slitnaði landsstýrissamgongan orsakað av uttanlandasiglingini.

Í 1981 tók landsstýrið hjá Paula Ellefsen við, og nú var ikki longur politiskur vilji til, at landið skuldi reka uttanlandasiglingina.

Meira a næstu síðu



# Óli fór frá sum stjóri í 2005

***Óli Hammer fór frá sum stjóri í Smyril Line 1. apríl 2005***

– Eg vildi sleppa burtur, tí heilsan var farin at bila. Vit stovnaðu felag saman við Bluewater, Smyril Bluewater, at taka sær av farminum. Eg bleiv nevndarformaður sat har, til eg var 67 í 2011.

Smyril Bluewater hevði farmin umborð á Norrønu. Bluewater hevði so tænastuna at fáa farmin víðari, og tað gera teir enn.

Men hevði Óli ímyndað sær, at farmaparturin fór at gerast so stórur partur hjá Smyril Line?

– Nei tað hevði eg ikki, tí frá byrjan fingu vit jú forboð ímóti at flyta farm, fyri at vit ikki skuldu órógva hini reiðaríini, sum tað æt, men í veruleikanum var tað ein politiskur rossahandil, sigur Óli Hammer.

– Tá vit fingu hjálp aftan á Korsør-Kiel royndina, bleiv forboðið tikið burtur, sigur Óli Hammer – tí at Jóannes Dalsgaard, løgtingsmaður, setti tað sum treyt fyri at atkvøða fyri.

Felagið fekk 11 millónir krónur í veðhaldi ta ferðina.

– Og tað var goldið aftur áðrenn 1990, og tá vóru vit kvitt við landsstýrið, sigur Óli Hammer.

Landið hevur alla tíðina átt 20 prosent. Og saman við Framtaksgrunninum átti landið eitt skifti meirilutan í felagnum.

Nú eigur landið 16,24 prosent og Framtaksgrunnurin 6,33 prosent.

# DFDS gavst at sigla í 1992


Tað fekk stóran týdning fyri raksturin hjá Norrønu, at DFDS gavst á føroyarutuni í 1992

***Winston Churchill var tað síðsta ferðamannaskipið hjá DFDS í Føroyasigling***

Eirikur Lindenskov

Tað stóra lopið í uttanlandasiglingini var skiftið frá Smyrli til fyrru Norrønu í 1983.

– Smyril tók bara 500 ferðafólk, meðan Norrøna tók 1050. Smyril hevði 450 koyggjur, Norrøna hevði 900. Ferðafólk lógu allastaðni og svóvu umborð á Smyrli, sum rullaði illa, og tí lógu nógv við sjóverki og spýðu, sigur Óli Hammer.

Smyril fekk ikki stabilisatorar fyrr enn Norrøna var komin.

Norrøna var eitt nógv betri amboð, greiðir Óli Hammer frá.

– Ein fyrimunur við fyrru norrønu var, at hon hevði 400 koyggjur við kømrum við bað og wc. Tá fá fólk vóru við, so varð bara tað selt, greiðir Óli Hammer frá.

Kappingarneytin hjá Norrønu, Winston Churchill hjá DFDS hevði ikki koyggjur við wc, hann hevði felags wc úti á gongini.

Norrøna hevði eisini seks luksuskømur.

– Hon var eitt øgiligt frambrot, og vit máttu hava eitt slíkt skip fyri at kunna kappast við DFDS, sigur hann.

DFDS gavst at sigla til Føroyar í 1992. Tað var ov nógv við tveimum skipum, nú tíðirnar vóru vornar so ringar.

– Eg spurdi tí stjóran í DFDS, hvat tað kostaði at fáa teir at gevast við at sigla til Føroyar, tí tað var ein fidus hjá okkum at fáa teir vekk, sigur Óli Hammer.

Hann kendi stjóran á DFDS úr Frederikshavn, og hann visti, at teir hava dugað at sæð tølini. Tað gekk verri og verri hjá teimum.

– Vit máttu so gjalda eina ávísa upphædd, fyri at DFDS skuldi gevast, og teir blivu so agentar hjá Smyril Line í Danmark – og vit fluttu havn til Esbjerg, sigur Óli Hammer.

Eftir fimm ár í Esbjerg flutti Norrøna aftur havn til Hanstholm.